

www.oljan.fo

**Jan Müller** 01 - 06 - 2013

# Betra vitanarstøðið undir oljuleiting í Norðuratlantshavi

Í døgunum 26. til 28 mai var Jarðfeingi vertur fyri NAG-TEC arbeiðsfundi á Hotel Føroyum. NAG-TEG, ið stendur fyri Northeast Atlantic Geoscience Tectonostratigraphic Atlas, er ein stór norðurevropeisk verkætlan, hvørs endamál er at gera eitt nágreiniligt jarðfrøðiligt kort og eina lýsing, ið millum annað skal betra um vitanarstøðið undir oljuleiting í Norðuratlantshavi skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu. Samstarvið fevnir um átta norðurevropeiskar jarðvísindastovnar, harímillum Jarðfeingi. Síðani verkætlanin fór av bakkastokki fyri tveimum árum síðani, hava verið fimm felags arbeiðsfundir, ið hava verið hildnir í fimm ymiskum luttakandi londum, og hesuferð áttu Føroyar tørn.  Byrjað varð sunnudagin 26. mai við einum felttúri, ið jarðfrøðingarnir Uni Árting og Uni Petersen skipaðu fyri. Út við 50 luttakarar vóru við. Hesin túrur hevði sum høvuðsendamál at greiða frá og vísa vísindafólkunum ta føroysku jarðfrøðina, men tíð var eisini at vísa teimum Tinganes, har Sámal Tróndur Finnsson Johansen, cand. scient. soc., greiddi frá. Harumframt var høvi til ein longri steðg við Gjógv, áðrenn farið var aftur til Havnar. Mánadagurin og týsdagurin vórðu settir av til felags framløgur umframt arbeiðsfundir. Áðrenn framløgurnar byrjaðu mánadagin segði Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi, nøkur orð. Mánadagurin hevði til endamáls at vísa sponsorunum, ið umboða 13 ymisk oljufeløg umframt BGR (The Federal Institute for Geosciences and Natural Resources) úr Týsklandi, hvussu langt arbeiðið er komið. Týsdagurin varð settur av til arbeiðisfundir í teimum ymisku arbeiðspakkunum. Næsti arbeiðisfundur verður í Dublin í oktober í ár. Eftir ætlan verður atlassið liðugt komandi summar. Myndir Hugt var millum annað at týðiligu sporunum eftir viðabulum, ið kunnu síggjast við Sundsháls á Oyggjarvegum. Eisini varð vitjað í Tinganesi. Kelda: www.jardfeingi.fo